# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Hóskvøldið 19. oktobur**
***Sambýlið á Heygnum:*** Elsa Funding í sambýlinum á Heygnum kl. 19.30.

**19. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan kl. 11.00:*** Heri Joensen og Bergur D. Joensen, altarg.
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Marjun Lómaklett
***Kaldbak:*** kl. 12.00 Sonja Klein, altarg.
***Sandavágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Hósvík:*** kl. 11.00 Marjun Bæk
***Gjógv:*** Kl. 12 messa Emil Olsen.
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Barna- og Familjugudstænasta (Barnakór Glyvra kirkju syngur)
***Skála:*** kl. 11, altargongd, Jógvan Fríðriksson.
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12.10, altarg., ***(talvan fyri Kirkjutíðindi)*** Jógvan Fríðriksson.
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00 Familjugudstænasta, Sverri Steinhólm
***Hellurnar:*** kl. 18.00, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Uni Næs
***Viðareiði:*** kl. 12.00, altarg., Elsa Funding. ***Talvan gongur fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini***
***Skopun:*** kl. 12.00 Jákup R. Hansen
***Porkeri:*** kl. 12.00, altarg., Patrick de Neergaard
***Fámjin:*** kl. 11.00, altargongd, Jónsvein Bech.
***Sandvík***: kl. 17.00, altargongd, Jónsvein Bech

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur 19. okt. kl. 17.00 Barnakórið venur. Kl. 20.00 Bíbliutími v/ Regin Olsen, Rómv. kap.7
Sunnudagur kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Hera Tróndheim.
Mánakvøld 23. okt. Kl. 20.00 Hjúnalags- og familjukvøld við Steen Palmquist.
Evni: Munur er – tíbetur!

**Youth With A Mission-Føroyar**
***Skeið í Miðlahúsinum.***
Skeið við Sannu Smith Hammer um Guds náttúru og eyðkenni leygardagin 28.10. kl 10.00 - 17.00. Vegna døgverða tilmelding á tlf. 217141 ella 214027.

**Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum - Talari: Petur í Gong kl. 20.00 Kvinnumøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti.
www.ebenezer.fo

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti.
***Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla***
Kl. 10.30 á familjumøtinum verður »Leikur, Promiseland, Lívsdropin & Christmas Child«, sunnudagsskúlin skipar fyri.
Kl. 11.30 Samfelagsløta.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 er evnið »Fyrigeving í hjúnabandinum«, talarar verða Róland og Elsa í Skorini. Undir møtinum er barnaansing.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúlin. Møtini sunnudag kunna hoyrast á netinum.
Pakkar til Christmas Child kunna avleverast.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli á Norðasta horni, kl. 18.00 Møti við Sigurd Syderbø.

**Katólska Kirkjan**
Fríggjadag kl. 17.30 Messa i Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa við Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Aglow í Havn**
Fundur verður í Miðlahúsinum leygarkvøldið kl. 19.30, Elin Tausen talar og Birgit Thomsen syngur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Hósdagin kl. 16.00 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18.00 evangeliskt møti við Eyðvør & Steinbjørn Olsen.
http://www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdag kl.20,00 Heimaforbund fyri allar kvinnur. (Árasøla verður 26.10).
Sunnudag møti kl. 11.00. Sunnudagsskúli kl. 14.00. Bøn kl. 17.30. Vitnimøti kl. 18.00.
www.frelsunarherurin.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl 20.00 ungdómsmøti v/Jóhannes Arge.
Fríggjakvøldið kl 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta /George El Khoury, kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl 18.00 vitnimøti.
Mánadagin kl 17.15-18.00 venur barnakórið, kl. 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími fyri limir.
Mánadagin 23. okt. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Honnu Danielsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 19.00 Chill.
Í morgin kl. 6.00 morgunbøn, kl. 22.00 bøn.
Leygardagin kl. 21.00 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 morgungudstænasta, Tummas Jacobsen tosar, kl. 11.30 Barnagudstænasta.
Øll eru hjartaliga vælkomin
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir.**
Hósdagur kl. 20 Ungdómsmøti í Hebron vegna umbygging av Ebenezer.
Sunnudagur kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Páll Poulsen.

**Evangelisk møti í Vakhús í Sandavági**
Leygarkvøldið 21. okt. kl. 20.00 og sunnukvøldið 22. okt. kl. 18.00 við vitnisburði, talu og sangi. Tórmund og fleiri luttaka. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Inga og Vinjard Magnussen tala. Mikukvøldið kl. 20.00 undirvísing og bøn. Hóskvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 19. okt. kl. 20.00. Mint verður á jólapakkarnar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Sørvági.**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14. Barnakórið syngur og dansar, og skógvaeskjurnar verða innsavnaðar. Møti sunnukvøldið kl. 18 við luttøku frá BláKrossfeskafeini.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin 22/10 morgunmøti við breyðbróting klokkan 11.00.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18.00 møti við Hans Paula Højgaard o.ø.
Mánadagin kl. 19.30 sjómanskvinnuringurin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta verður hvørt kvøld hesa vikuna kl. 19.30.
Vikuskiftis møtir verða leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Lovsongsløta verður ½ tíma áðrenn.
Luttøka verður úr Sandoynni, Havn og Norðurstreymoy.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími.
Í sambandi við 20 ára dagin hjá Hvalvíkar missiónshúsið verður skipað fyri vikuskiftismøtum leygardagin við Streingjakórinum úr Porkeri og sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og møti kl. 18.00 við Meinigheitskórinum úr Havn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 23/10 húsmøti hjá Kirstin og Eirik Samuelsen, klokkan 20.00.
Ver hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Arnold Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17, Møti við George El Khoury. Barnamøti kl.17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Lívins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl.16.00 Liljur.
Sunnudagin kl.10,30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.00.
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 14.30, og møti verður kl.18.00, har Margeir Toftegaard talar.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 14.30 verður sunnudagsskúli, kl. 18.00 møti har Skopuningar tala, syngja og vitna og kl 21.00 ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo gloria**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/heimligum kreftum.
Mánakvøld kl. 20.00 bønarmøti, kórið venur aftaná.

**Missiónshúsið í Skopun**
Hósdagin kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00 verður sunnudagsskúli. Vegna vikuskiftismøtir í Vági verður møti avlýst.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum í Porkeri leygarkvøldið 21. okt. kl 21 við Katrin Mortensen, Øravík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hóskvøld kl. 20.00 Bønarløta.
Sunnudag kl. 11.00 Halgunarmøti. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18.00 Evangeliskt møti har evnið er »Kritikksjúka - Dømisjúka«. Loytnantur Ragnar Ludvig talar.
Mánadag kl. 7.00 Morgunbøn.
Leygardagin 4. nov. kl. 19.00 skipa vit fyri árasølu!
Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
www.frelsunarherurin.fo

**Meinigheitshúsið í Vági**
Vikuskiftismøtir vera við Niels Jacob Nielsen, Sverra Kass og Knút Larsen.
Sangkór úr oynni vera við.
Fríggjakvøldið og leyðarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00.

**Frá Missiónshúsinum í Vági**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 tala Niels Jacob Nielsen og Jógvan Højgaard
Kór úr oynni luttekur.

**Felagið Tórshavn - baraldartúrur**
Árið í ár hevur verið framúr gott berjaár. Uppi á Svínoynni er einasti baraldarskógur í Føroyum, og heimildarfólk okkara siga frá, at baraldarrunnarnir bera ber í ár. Tí fer gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn baraldarberjatúr út í Svínoy sunnudagin 22. oktober.
Farið verður av Kunningarstovuni í Havn kl. 10.00, og komið verður aftur til Havnar uml. kl. 21.00 við leigaðum farti. Gingið verður einar 5 – 6 tímar. Havi góð og heit gonguklæði/regnklæði við, matpakka og drekka til allan dagin.
Avmarkað luttøka – tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 30 24 25 og 31 57 88. Kostnaður 400,00 kr.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Søguligur gongutúrur sunnudagin 22. okt. eftir varðgøtuni Æðuvík - Nes. Vit møtast við missiónshúsið í Æðuvík kl. 16.00. Ferðaleiðari Jógvan Ingvard Olsen. Aftaná verður vitja í Prestagarðinum á Nesi, har drekkamunnur verður at fáa, kostnaður 50 kr. at gjalda við dyrnar. Tilmelding á Kunningarstovuni í Runavík innan kl. 15.00 fríggjadagin 20. oktober. Bussur koyrir aftur til Æðuvíkar.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mánadagin 16. okt.:
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobbspæl, dart o.o. spøl.
*Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding á tlf. 316491.*
Týsdagin 17. okt.:
kl. 10.00-11.30: Vit synja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Føroyingur í Saudi, Jonna Færø
Mikudagin 18. okt.:
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10.00-12.00: Vælgerandi handverksætlan á loftinum.
kl. 12.00: Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmelding mánadag á tlf. 316491.
kl. 15.00: Túrur: við ella uttan stavar, úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
Hósdagin 19. okt.:
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 11.00: Lesibólkurin, Bergljót Madsen
kl. 14.00-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagin 20. okt.:
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10.00-12.00: Vælgerandi handverksætlan á loftinum.
kl. 12.00: Døgurði, tilmelding tlf. 316491.
kl. 14.00-17.00: Opið hús.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn**
*Tinghúsvegur 18*
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Dagtilhaldið á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.
***Hósdagin 19. oktober***
kl. 15.00 til 18.00. Ole Lauritsen sigur frá. Øll vælkomin.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Vegna tekniskt brek í Kvinnufelagshúsinum, er dagtilhaldið fyribils í húsinum hjá eldrafelagnum Nón.
Skrá viku 42.
***Mánadagur 16. okt.***
Boccia fyri áhuga, opið hús.
***Týsdagur 17. okt.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
- Hevur tú hug at binda skóleistar v. Elisabeth Hammer? Tógv fæst á staðnum. Havið stokkar við.
***Mikudagur 18. okt.***
Skóleistahugni v. Elisabeth Hammer.( Tógv fæst á staðnum. Havið stokkar við.)
***Hósdagur 19. okt.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur 20. okt.***
Fimleikur.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15.
***Mikudag*** er ítriv við Rigmor.
***Hósdag*** er fimleikur við Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30